

*Alt er gjørt fyri at starvsfólkini skulu trívast í tí nýggja EIK-bygninginum í Klaksvík – vinstrumegin Lisa Tróndheim, Hansina Sigurðsson, deildarleiðarin Hilmar Sam Lamhauge, Oddbjørg Sigurðsson og Margit G. Joensen*

# Vit eru komin fyri at verða

**- Við nýggja bygninginum ynskja vit greitt at signalisera tann áhugan, sum vit í dag hava fyri Norðoyggjum, og sum vit eisini fara at hava í framtíðini, sigur Hilmar Sam Lamhauge, deildarleiðari hjá EIK í Klaksvík**

BANKAVIRKSEMI

*Orð&myndir: Snorri Brend*
*Snorri@sosialurin.fo*

**Klaksvík**: Seinnapartin í morgin kann EIK flyta virksemið sítt í ein nýggjan og snotuligan bygning í miðbýnum í Klaksvík.

Talan er um ein stóran deildarbygning í tveimum hæddum, har virksemið hjá EIK fer at verða í framtíðini.

Hóast tað ikki stendur so væl til fíggjarliga í Klaksvík, metir Hilmar Sam Lamhauge tað ikki vera skeivt at byggja ein slíkan bygning beint nú.

- Bygningurin liggur sera væl fyri – miðskeiðis í býnum, beint við standmyndina og er eitt satt prýði fyri býin.

- Eg havi eisini skilt, at fólk eru sera fegin um at bygningurin tekur seg so væl út í landslagnum, staðfestir deildarleiðarin hjá EIK í Klaksvík.

Tey hava valt at gera nógv burtur úr hesum bygninginum, sum eisini skal vísa fólki í økinum á, at EIK framvegis fer at verða ein týðandi partur av menningini í økinum – eisini nú, ið fíggjarkreppa er kring heimin og í tí lokala økinum.

- Klaksvík fer heilt víst at reisa seg aftur!

## Bjartskygni

Sum peningastovnur er EIK annars nýggjur í Norðoyggjum.

Virksemið byrjaði ikki fyrrenn í mars mánaði í 2006 í leigaðum hølum. Síðani tá er virksemið økt ár undan ári, og nú er tíðin komin hartil, at tey vilja staðfesta, at tey eru komin fyri at verða í fiskivinnuhøvuðsstaði okkara.

Tá talan er um fiskivinnuna, er altíð talan um upp- og niðurgangstíðir, og soleiðis er eisini í Klaksvík í løtuni. Her er so at siga einki fiskaarbeiði og spurningurin er, um býurin ikki fer at missa seks av trolarum sínum í næstum.

- Tíðirnar eru broyttar nógv, síðani vit byrjaðu her. Men vit síggja kortini bjart uppá framtíðina.

- Vit ivast onga løtu í, at tað fer at ganga gott aftur, staðfestir Hilmar Sam Lamhauge.

## FAKTA

**Nýggi EIK-bygningurin í Klaksvík**

EIK byrjaði virksemið sítt í Norðoyggjum í mars mánaði 2006.

Arbeiðið við nýggja bygninginum byrjaði á heysti í fjør.

Teknistovan hjá Árna Winther hevur teknað bygningin, sum verður tikin í nýtslu fríggjadagin 28. november.

Bygningurin er í tveimum hæddum, umleið 300 fermetrar hvør, og fer at hýsa virkseminum hjá EIK og hjá INNI.

Seks fólk starvast á deildini hjá EIK í Klaksvík.



*EIK hevur higartil hildið til í leigaðum hølum í Bøgøtu. Nú verður virksemið flutt í tann nýggja bygningin, smáar hundrað metrar nærri miðbýnum í Klaksvík*